# Úr myrkrinum kom Marstin



*Tað sæst langan veg, at Martin í Grund og Pætur Zachariassen í Boys in a Band hava drukkið úr somu keldu í Gøtu*

## Martin í Grund - við sínum Revelators - kom úr myrkrinum og royndi at vísa fólki ljósið á ein ordiliga undirhaldandi hátt

Tá Marstin and the Revelators kom á pallin var bølaetandi myrkt, áðrenn ljós kom á trummuspælaran, sum slapp at buka eina løtu áðrenn Martin sjálvur kom í fokus, sum tann sera karismatiski frontmaðurin, hann er.

Hetta gjørdu teir eisini í fjør, men so kanska teir kundu funnið upp á okkurt annað næstu ferð, hóast tað var eins stuttligt at uppliva hesaferð.

Fyrsta lagið, opinberararnir komu við minnast vit aftur frá festivalinum í fjør, har hann syngur um eplið, sum hevur okkurt við syndina og eina tertu at gera, tí onkur ikki leggur í frukt.

Men at teksturin ikki er so lættur at skilja, er ikki so ringt at skilja, tí hóast tónleikurin er eitt slag av tónleiki, ið er rættiliga sermerktur og serstakliga undirhaldandi, tá mann bæði spælir valstakt og meira skríggjar enn syngur, so rópar og tuskar Marstin í Grund so nógv á pallinum, at hann er torførur at skilja.

### Enskur rokkur

Generelt er tónleikurin rættiliga lættur og er eitt slag av enskum rokki. Samstundis sum Martin í Grund á onkran hátt minnir um Pætur Zachariasen. Kanska er tað okkurt í vatninum í Syðrugøtu, sum ger fólk eitt sindur meiri karismatisk enn aðrastaðni í landinum.

Samanumtikið kann staðfestast, at bólkurin fekk eitt betri pláss á skránni í ár enn í fjør, tí niðara hæddin var full av fólki, ið vildu uppliva gøtumannin og hansara fleirtjóða bólk á pallinum.

Hinvegin er ilt at siga, um tað vóru so nógv fólk fleiri, samanborið við aðrar konsertir á festivalinum, tí ovara hæddin var stongd av.

Marstin and the Revelators endaðu við at fáa alla fjøldina í høllini at semjast um at fara ímóti streyminum við at syngja la la la á ein ávísan hátt.

# Heine og Hann



**Tað er ikki so nógv meira at siga um Heina, tí hóast hann er óbroyttur, er hann væl verdur at lurta eftir, og heldur verandi gongd fram, verður hann eisini verdur at lurta eftir í næsta ár**

Um tú heldur, at tú kennir orðini í innganginum til henda tekst aftur, so er tað ikki løgið, tí 30. august í fjør stóðu júst somu orð á Planet.fo. Hinvegin eru orðini eru minst líka galdandi í ár, tí tað er onki broytt við Heina Lutzen, síðan í fjør, í fyrrárið, ella so leingi Fjarðafestivalurin hevur verið til.

Heine Lutzen heldur fram í sama spori, men eftir øllum at døma er onki galið við tí, tí bara Jeremy Camp hevur haft størri áskoðarafjøld á Fjarðafestivalinum í ár.

Einasti eyðsýndi munurin á fjøldunum er, at Jeremy Camp fekk yngru fólkini, og kanska serliga kvinnurnar at leita sær í Kelduna. Í dag er tað eldru fólkini, sum dáma betri at sita niðri og lurta at tónleiki, so fólk vóru munandi fleiri á loftinum, har tað ber til at sita niðri. Í gjár var munandi tættari á gólvinum, har fólk livdu við øllum kroppinum til tónleikin. Í dag er tað kanska meira í høvdinum, at áhoyrararnir liva.

Skuldi onkur verið, sum ongantíð hevur hoyrt Heina Lutzen, so spælir hann nógvar sálmar, ið eru latnir í annan ham, samstundis sum hann syngur bæði friðarligar, inniligar og rokkuttar sangir. Alt hetta við síni eyðkendu rødd.

# Vox trekti fólk

**Sangbólkurin Vox var á pallinum á Fjarðafestivalinum í kvøld, og høvdu tey eina sterka gospel framførslu. Tey eru fimti bólkurin á palli í kvøld**

**Leygarkvøldið regnaði í Skálafirði, men festivalurin er innandura, so nógv fólk leitaðu inn í Kelduna í Skálafirði at hoyra gospelbólkin, Vox.**

**Fyrsta vápni hjá Vox í boðskapinum hjá teimum eru 13 sangarar, ið bera framførsluna, men tey nýta eisini ymisk ljóðføri, fyri at fáa eitt sindur meiri futt í.**

**Tey flestu eru samd um, at fólkini, ið fingu møguleika at syngja solo, komu heilt væl frá uppgávuni, samstundis sum heildar upplivingin var ein sterk lovsongsløta.**

**Fyrr um kvøldið vóru Fríðbjørg Jensen, Tórhild Bjarkhamar, Sølva Ford og Jan Honningdal á pallinum.**



*Vox var einasta kórið á Fjarðafestivalinum*